# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



***Heimaskiparar.** Aftara rað f.v.: Regin Brattaberg Absalonsen, Vágur, Bárður Sonni Dimon, Vágur, Óli Andreas Hanusarson Hammer, Eiði, Jørgin Joensen, Morskranes, Johnny Sigurdsonur Johannesen, Oyri, Hans Pauli Juul, Skopun, Bárður Mikkelsen, Vágur, og Ragnar Groth Mortensen, Øravík.*
*Framra rað f.v.: Ragnar Mouritsen, Hoyvík, Mikkjal Petur Næs, Hvalba, Ólavur Groth Olsen, Tórshavn, Rógvi Olsen, Skopun, Sámal Olsen, Rituvík, Ronni Svalbard, Nes Eysturoy, og Rúni Weihe, Selatrað.*
*Vanta á myndini: Magnus Bjarnason, Tórshavn, Kári Lindenskov Dal Christiansen, Hoyvík, Helgi Hansen, Strendur, og Djóni Kári Thomassen, Miðvágur*
*Virðislønir: Ragnar Mouritsen hevur fingið barograf frá Skipara- og Navigatørfelagnum, Ragnar Groth Mortensen hevur fingið kikara frá Føroya Sparikassa, og Rógvi Olsen hevur fingið Alisfrøði, Fiskivinna og Fiskivinnumál 1-3 frá Føroya Fiskimannafelag*
*Mynd: Lasse Borðoy*

## Próvtøkur á Føroya Sjómannskúla

**Fríggjadagin 25. juni vóru próvtøkur á Føroya Sjómansskúla, har heimaskiparar, skiparar og skipsførarar fingu prógv.**



***Skiparar:** Aftara rað f.v.: Regin Brattaberg Absalonsen, Vágur, Knút Brandal, Klaksvík, Gundur Gaardbo, Søldarfjørður, Hans-Kári Fríðrik Jacobsen, Vestmanna, og Torbjørn Jacobsen, Kaldbak.*
*Aftara rað f.v.: Johnny Sigurdsonur Johannesen, Oyri, Sigvald Kristiansen, Strendur, Bárður Mikkelsen, Vágur, og Hans Petur Samuelsen, Haldórsvík.*
*Vanta á myndini: Haldor Hammer Haraldsen, Sandavágur, og John Johansen, Tórshavn.*
*Virðislønir: Regin Brattaberg Absalonsen hevur fingið klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Knút Brandal hevur fingið pennasett frá Søfartens Ledere, Sigvald Kristiansen, Skipari hevur fingið kikara frá J. C. Hempels Legatfond.*
*Mynd: Lasse Borðoy*



***Skipsførar:** Fremra rað f.v: Bárður Kjartansson Egholm, Eiði, Ingi Ellingsgaard, Eiði, Martin Gøthe, Norðragøta, Rúni Hansen, Hoyvík, og Hanus Debess Højgaard, Tórshavn.*
*Aftara rað: Niels Johannes í Buð, Hvannasund, Kjell Johansen, Strendur, Sverrir Bjørn Kjærbo, Skopun, og Janus Petersen, Húsavík.*
*Virðislønir: Bárður Kjartansson Egholm hevur fingið ur frá Rederiet A. P. Møller, Janus Petersen hevur fingið pennasett frá Søfartens Ledere, og Kjell Johansen, skipsførari hevur fingið klokku og barometur frá Skipafelagnum Føroyar*
*Mynd: Lasse Borðoy*




Poul Jacob Lundsbjerg



Símun Joensen

**Móttøka á Kafé Blákrossstovuni**

Í samband við at Símun Joensen fer frá sum leiðari á Kafé'ini, og at Poul Jacob Lundsbjerg tekur við starvinum sum nýggjur leiðari á Kafé'ini, verður skipað fyri almennari móttøku á Kafé Blákrossstovuni.

**Mánadagin 5 juli kl. 20:00 - 23:00**

Øll eru í hesum sambandi hjartaliga vælkomin at hyggja inn á gólvið at heilsa uppá teir báðar

Bláí Krossur Føroya
Kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur

www.blakross.fo

Sosialurin 341800




**UTTAN ÚR HEIMI**

# 10.000 fara doyggja í juli

**Fáa tey neyðstøddu flóttafólkini í Darfur ikki hjálp alt fyri eitt, kunnu 10.000 doyggja av kolera og øðrum sjúkum í hesum mánaðinum≤**

NEYÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hjálparfólk, sum hava verið í flóttafólkalegunum í sudanska landspartinum Darfur, siga, at vandi er fyri, at ein kolerasótt kann fara at gera um seg í legunum, nú regntíðin er byrjað.

David Nabarro hjá heimsheilsustovninum WHO sigur við tíðindastovuna Reuters, at sjúkan kann raka ímillum 200.000 og 300.000 flóttafólk.

– Vit vænta, at 10.000 fólk fara at doyggja í hesum mánaðinum, verður einki gjørt fyri at hjálpa teimum, sigur David Nabarro. Hann sigur, at eydnast tað at útvega teimum ringast støddu hjálp, fara munandi færri at doyggja, men kortini roknar hann við, at eini 3.000 fólk fara at doyggja av kolera og øðrum sjúmum.

ST og fleiri hjálparfelagsskapir læra seg um, at tað gongur ov striltið at útvega flóttafólkunum í Darfur hjálp. Fleiri felagsskapir leggja ta sudansku stjórnina undir at forða hjálpararbeiðinum, og tí hevur USA biðið ST seta tiltøk í verk ímóti Sudan.

# Hann skal ikki dømast til deyða

**Bretska stjórnin góðtekur ikki, at Saddam Hussein verður dømdur til deyða**

REVSING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Bretland og Frakland eru ímóti, at Saddam Hussein fær deyðarevsing*

Serdómstólurin í Irak hevur ákært fyrrverandi einaræðisharran Saddam Hussein fyri krígsbrotsverk og fyri at hava beint fyri túsundtals irakum. Í sambandi við rættarmálið hevur irakska stjórnin sett deyðarevsing í gildi, og lítið er at ivast í, at tað er gjørt fyri at geva dómstólinum heimild til at døma Saddam til deyða.

Men hesum eru fleiri lond ímóti. Bretland, sum var við til at koyra Saddam Hussein frá, er ímóti, at hann verður dømdur til deyða.

– Vit eru ímóti deyðarevsing, og í hesum førinum hava vit boðað iraksku stjórnini frá støðu okkara, segði ein talsmaður hjá Tony Blair, forsætisráðharra í gjár. Hann ásannaði kortini, at tað eru irakar, sum eiga avgerðina í málinum.

Franska stjórnin hevur somuleiðis gjørt greitt, at eftir hennara tykki eigur tann gamli einaræðisharrin ikki at verða dømdur til deyða.

# Misnýttu sítt egna barn og fleiri onnur

**Í Fraklandi eru tíggju fólk dømd fyri at hava misnýtt fleiri børn**

PEDOFILI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fronsku hjúnini Myriam og Thierry Delay eru dømd ávikavist 15 og 20 ára fongsul. Tey bæði vórðu funnin sek í at hava staðið á odda fyri einum lítlum bólki, hvørs virksemi var at misnýta børn kynsliga. Ímillum børnini var teirra egni sonur.

Í rættinum í býnum Outreau viðgekk mamman grátandi, at bæði hon og maðurin vóru sek í at hava oyðilagt lívið hjá fleiri børnum.

Grannar teirra, hjúnini Aurelie og David Delplaque, vóru uppi í bólkinum, og tey fingu ávikavist fýra og seks ára fongsul.

Kanningarnar hjá fronsku løgregluni avdúkaðu, at 17 fólk høvdu verið í bólkinum, og at tey høvdu misnýtt 18 børn í árunum frá 1995 til 2000. Tað yngsta barnið vara bara trý ár.

Rættarmálið, sum byrjaði tíðliga í mai, hevur skakað Frakland, og fransmenn bíða nú eftir tí næsta málinum, eftir at ein skóghøggari hevur viðgingið, at hann burturflutti, meyðtók og myrdi fleiri gentur í Fraklandi og Belgia.

## Hjálpa fangum at flýggja

Teir seinastu mánaðarnar hevur amerikanska hersetingarvaldið í Irak roynt at venja irakar at arbeiða sum løgreglumenn og fangavørðar, men nú vísir tað seg, at teir iraksku fangavørðarnir hava hjálpt fleiri fangum at flýggja.

Sambært amerikanarunum hava fangavørðarnir í Abu Ghraib-fongslinum hjálpt minst trimum fangum at flýggja. Í einum øðrum føri gjørdu nakrir fangar uppreistur við tí úrsliti, at teir iraksku fangavørðarnir tóku til rýmingar. Amerikanski heryvirmaðurin David DiNenna sigur við Reuters, at amerikanararnir hava størri stríð av at halda eygað við fangavørðunum enn fangunum.

Síðani amerikanararnir yvirtóku eftirlitið við teimum iraksku fongslunum, eru 15 fangar deyðir í fongslunum. Í fleiri førum er illgruni um, at amerikanskir hermenn hava farið so illa við fangum, at teir eru deyðir, og ætlanin er at kanna 11 av teimum 15 tilburðunum, skrivar Reuters.

## Milliardir til val

Demokratiski senatorurin John Kerry, sum skal bjóða George W. Bush, forseta av á forsetavalinum í heyst, hevur nú savnað meiri enn1,1 milliard krónur til valstríðið.

Mary Beth Cahill, sum leggur valstríðið hjá Kerry til rættis, sigur, at í juni eydnaðist tað at savna meiri enn 200 milliónir krónur, og at higartil hava meiri enn ein millión fólk og fyritøkur latið stuðul til valstríðið. Sjálv heldur Mary Beth Cahill, at nógvir amerikanarar taka undir við hugsjónini hjá Kerry um, at USA má endurvinna virðingina í umheiminum.

Sjálvt um John Kerry hevur savnað meiri enn 1,1 milliard krónur til valstríðið, skal hann savna eitt sindur afturat, ætlar hann sær at hava líka nógvar pengar sum Bush. Sambært teimum seinastu upplýsingunum hevur Bush savnað umleið 1,3 milliard krónur til sítt valstríð.

## Búgvin tolir ikki skvøtt

Tað ljóðar næstan sum skemt, men í Noregi hava vegamyndugleikarnir trupulleikar av fuglaskvøtti.

Í september eru tíggju ár, síðani Nordhordalandsbúgvin við Bergen bleiv tikin í nýtslu. Fleiri av stabbunum á norðara enda á brúnni hava fingið ein grønligan lit, og sambært vegamyndugleikunum kemst tað av, at likkur og másar javnan skvøtta á stabbarnar. Verkfrøðingurin Einar Noremark sigur við tíðindastovuna ANB, at í fuglaskvøtti er eitt evni, sum fer illa við betongstabbunum, og tað er sera óheppið fyri brýr sum eitt nú Nordhordalandsbrúnna, sigur hann.

Vanliga plag vindur og regn at loysa trupulleikarnar, tá heystið kemur, men soleiðis var ikki í fjør, og tí eru fleiri av stabbunum grønir á liti í ár. Kortini ætla vegamyndugleikarnir ikki at gera nakað við trupulleikan nú, tí sambært Einari Noremark er ikki neyðugt at gera nakað, fyrr enn brúgvin er eini 20 ára gomul.

## Dýrt "óhapp"

Í hálvleikinum í amerikonsku Super Bowl-kappingini fyrr í ár sang songkvinnan Janet Jackson. Alt bleiv sent beinleiðis í sjónvarpinum, men mitt undir sanginum hendi tað, at plaggið, sum fjaldi annað bróstið hjá songkvinnuni, datt niðurfrá.

Sjálv helt Janet Jackson uppá, at talan var um eitt óhapp, men mong vildu vera við, at "óhappið" var tilætlað. Í øllum førum vildi fjølmiðlaeftirlitið ikki góðtaka tað, sum hendi, og tað hevur nú dømt sjónvarpið CBS at gjalda 3,3 milliónir krónur í bót. Sambært eftirlitinum var tilburðurin ósømiligur.

"Óhappið" hjá Janet Jackson vakti so stóran ans, at amerikanskir politikarar valdu at taka málið upp. Kongressin og Umboðsmannatingið hava síðani samtykt at herða revsingina fyri at tílíkt - óhapp ella ikki.